STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

Sálarfrøðingur

Á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðarstarv hjá kliniskum sálarfrøðingi leyst at søkja til setan frá 1. september 2007 ella eftir nærri avtalu.

Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið og hevur 60 seingjarpláss við umleið 300 innleggingum árliga. Harumframt er dagdeild og stórt ambulant/økispsykiatriskt virksemi. Psykiatriski depilin hevur eisini tilhýrstænastu á øðrum sjúkrahúsdeildum umframt ávísa embætisskyldu úteftir, t.d. mentalobservatiónir o.a.

Vit vilja fegin, at tú hevur:

- Cand. psyk. ella tilsvarandi útbúgving við autorisatión og spesialistgóðkenning.
- Hollan førleika og royndir í at fremja psykodiagnostiskar kanningar (kognitivar og projektivar tests) sv.t. støðið í t.d. mentalobservatiónum.
- Góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum diagnostiskum og viðgerðarligum arbeiði saman við øðrum fakbólkum.
- Førleika og royndir til at fremja sjálvstøðugt psykoterapeutiskt virksemi innan nøgvar ymsar viðgerðaruppgávur.
- Fyrimunur er, um tú skilir, tosar og skrivar føroyskt.

Kandidatar uttan autorisatión, spesialistgóðkenning og supervisjónsførleika kunnu eisini søkja.

Vit kunnu bjóða tær:

- Eitt spennandi og mennandi arbeiðsøki við møguleika fyri viðkomandi skeiðum og fakligari kvalifisering.
- Dynamiskt samstarv í tvørfakligum eindum.
- Fjølbroyttar arbeiðsmøguleikar bæði á Psykiatriska deplinum og uttanfyri í samstarvi við aðrar skipanir og deildir innan almanna- og heilsuverkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til læknafakliga depilsleiðaran á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, Tormóð Stórá, á telefon 304500, lokal 4113, tost@lsh.fo ella leiðandi sálarfrøðing Hera Kragesteen, lokal 4150, hekr@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 1. juli 2007

Sjúkrarøktarfrøðingur til Barna- og ungdómpsykiatriina

Á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum er eitt nýtt fulltíðarstarv til sjúkrarøktarfrøðing at arbeiða innan barna og ungdómspsykiatri leyst at søkja til setan frá 16. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Psykiatriski depilin er við at upp- og útbyggja eina barna- og ungdómspsykiatriska tænastu.
Tann, sum settur verður, kemur at innganga í tað tvørfakliga toymi.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.

- ambulantar kanningar av børnum og samrøður við teirra avvarðandi
- ambulant eftirviðgerð, so sum medisin og klinisk uppfylging
- ráðgeving og undirvísing.
- samstarv við myndugleikar og stovnar

Førleikakrøv:

- Góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- hollan kunnleika til psykiatri
- kunnleika at arbeiða við børnum og ungum
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, miðvíst og skipað
- Skal duga at leggja langtíðarætlanir
- Góð samstarvsevni
- Áhuga í at førleikamenna og spesialisera seg innan arbeiðsøkið.

Vit kunnu bjóða:

- eitt spennandi arbeiðsumhvørvi við nøgvum nýggjum avbjóðingum
- upplæring, skeið, eftirútbúgving og praktikkupplæring

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Juliu Zachariassen, telefon 304500, lokal 4173 juza@lsh.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Psykiatriska deplinum, Bergit Weihe, telefon 304500, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin 11. juni 2007 kl. 12.00

HVS-handverkari (endurlýsing)

Vegna ov fáar umsóknir verður lýst av nýggjum eftir HVS- handverkara til Teknisku deild til setan skjótast gjørligt.

Starvið fevnir m.a. um eftirlit og umvælingar av

ventilatiónsverkum og reinsiverki
hita- og dampskipan
køks- og vaskaríútgerð
køli- og frystiskipanum
luft- og gassskipanum
ávaringarskipanum til eld og annað
sterilisatións- og disinfektiónsútgerð
luttøku í vaktarskipan

Førleikakrøv

- útbúgving sum handverkari innan maskinøkið
- kunnleiki til stýrings- og reguleringsskipanir
- góð samstarvsevni
- gott tænastusinni
- gott handalag
- góður røkisskapur
- vilji til at eftirútbúgva seg her í Føroyum og uttanlands

Landsjúkrahúsið nýtir CTS-skipan & Maximo viðlíkahaldsskipan.

Vit kunnu bjóða:

- eitt spennandi og fjølbroytt starv
- fakliga kompetentar, góðar og virknar starvsfelagar

Nærri fæst at vita við at ringja til Suna Rasmussen, tekniska leiðara, telefon 304538, sr@lsh.fo ella til Jóan Símun Saltá, leiðara á maskinverkstaðnum, telefon 304536, jss@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 8. juni 2007 kl. 12.00

Sjúkraflutningstænastan

Á Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum eru tvey størv leys at søkja til setan 1. september 2007 ella eftir avtalu. Talan er um føst størv fulla tíð við eitt ára royndartíð.

Sjúkraflutningstænastan er ein deild við nøgvum ymiskum uppgávum. Ein av høvuðsuppgávunum er at vera ein bráðfeingishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði, harnæst er uppgávan flutningur av sjúkum og skaddum fólki og fólkum, ið eru rørslutarnað. Eisini hevur sjúkraflutningstænastan ábyrgd av øllum portørarbeiði, ið er á Landssjúkrahúsinum. Alt hetta setir stór krøv til starvsfólkið, sum mangan kemur at arbeiða undir serstøkum umstøðum.

Starvsøkini hjá Sjúkraflutningstænastuni fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágoy og Sandoy. Her starvast í løtuni umleið 35 fólk. Deildin hevur 13 bilar, íroknað 9 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina, er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða á støðini í Tórshavn í skiftandi vaktum og fær neyðugu upplæring í samband við starvið.

Førleikakrøv

- vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- kunna síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- evni til at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði er ein fyrimunur

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304503 til Jákup Nolsøe, leiðara.

Umsóknarfreistin er 8. juni kl. 12.00

Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

Audiologiassistentur til Hoyriklinikkina
Umsóknarfreistin er 31. mai 2007
kl. 12.00

Introduktiónstarv í intern med.
Umsóknarfreistin er 15. juni 2007

Fysioterapeutar (endurlýsing)
Umsóknarfreistin er 28. juni 2007
kl. 12.00

Introduktiónstarv í almen kirurgi
Umsóknarfreistin er 16. juli 2007

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er megin sjúkrahús Føroya við umleið 20 serlækniøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nøgvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo